Nr. 21/2019

Jóhannis Joensen
løgtingsmaður

Fyrispurningur eftir Tingskipanini § 52a

Fyrispurningur um umsitingarbygning til Sjóvinnustýrið, settur landsstýrismanninum í vinnumálum, Helga Abrahamsen (at svara skrivliga eftir TS § 52a)

1. Kann landsstýrismaðurin tryggja, at avtalan um at byggja umsitingarbygning til Sjóvinnustýrið ikki verður broytt, og at bygt verður í Vágum?
2. Ætlar landsstýrismaðurin at játta pening til bygningin á komandi fíggjarlóg?
3. Og um so er, kann landsstýrismaðurin upplýsa, nær bygningurin væntandi verður liðugur?

Viðmerkingar:
Undanfarna Løgting samtykti einmælt í 2017 at geva landsstýrismanninum við vinnumálum heimild til at byggja nýggjan umsitingarbygning til Sjóvinnustýrið. Landsstýrismanninum varð heimilað at halda byggiútreiðslur í sambandi við bygging av nýggjum umsitingarbygningi til Sjóvinnustýrið á upp til 13,7 mió. kr. Við uppskotinum varð víst á, at Sjóvinnustýrið skuldi hava eina framtíðartryggjaða loysn og støðugar karmar um virksemið hjá stovninum, og at ætlanin var at byggja ein bygning á slakar 900 m^2 , sum skuldi staðsetast á leigaða grund í Vágum. Løgtingslógin varð sett í gildi 1. januar 2018 og fer úr gildi aftur 31. desembur 2020.

Nú nýtt landsstýri hevur tikið við, kundi eg hugsað mær at fingið upplýst, um nýggi landsstýrismaðurin á økinum ætlar at halda fast við ætlanirnar hjá undanfarna landsstýri um at byggja umsitingarbygning til Sjóvinnustýrið við staðseting í Vágum, og nær vit kunnu vænta, at bygningurin stendur liðugur. Tí verður hesin fyrispurningur settur.

Á Løgtingi, 14. november 2019

Jóhannis Joensen